# Álit

# í

## ungdómstingsmáli nr. 4/2012: Uppskot til samtyktar um kantinur í fólkaskúlum

8. flokkur í Vágs skúla hevur lagt málið fram tann 6. februar 2012, og eftir 1. viðgerð tannn 6. februar 2012 er tað beint í Vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 6. februar 2012.

**Meirilutin** (Jógvan í Dímun Højgaard, Tóra á Løgmansbø Bláhamar, Hanus í Horni Nielsen, Jákup Poulsen, Kristina Mouritsen og Jóanis Albert Nielsen) heldur, at tað er trupult at ímynda sær, at vit í løtuni hava ráð til at byggja kantinur í øllum fólkaskúlum í landinum. Meirilutin er tó samdur við uppskotsstillarunum í, at tað ikki er nøktandi fyri trivnaðin og reinføri í skúlunum, at næmingar, sum eru í skúla allan dagin, skulu eta av sama borði, sum teir hava sitið og arbeitt við allan dagin. Meirilutin heldur, at tað hevði verið betri, um matarsteðgurin á skúlunum varð skipaður soleiðis, at næmingarnir fingu eitt matarhøli til taks á skúlanum, har teir kunnu eta matpakka ella annað. Eitt slíkt høli kundi t.d. verið opið frá kl. 11-13 hvønn dag, har ein lærari ansaði eftir, at alt gekk rætt fyri seg. Í hølinum kundi verið til taks ein ketil, ein mikroovnur, ein toastari o.a., sum næmingunum tørva til matarsteðgin. Um ein slík skipan skal virka eftir ætlan, metir meirilutin, at tað eigur at vera eitt krav, at allir næmingar á skúlanum eta í matarhølinum.

Meirilutin setir tí fram soljóðandi broytingaruppskot, sum mælt verður Løgtinginum at samtykkja:

**B r o y t i n g a r u p p s k o t**

”Løgtingið heitir á landsstýrið um at fyrireika og leggja fram lógaruppskot um matarhøli og uppskot um játtan á fíggjarlógini, ið kunnu tryggja, at allir fólkaskúlar/fólkaskúlaeindir hava eitt matarhøli til næmingar, har reinføri verður sett í hásætið.”

**Minnilutin** (Eyðrið Mortansdóttir og Marita Thorsteinsson), ið saman við 8. flokki í Vágs skúla hevur lagt málið fram, heldur fast við upprunauppskotið. Eitt matarhøli á hvørjum skúla, har næmingar kunnu eta sín matpakka, loysir møguliga reinføristrupulleikan, ið stendst av, at næmingar eta matpakka í skúlastovuni, men eitt matarhøli loysir ikki trupulleikan við, at allir næmingar eiga at fáa heilsugóðan mat. Ein kantina kann geva næmingunum frískan og heilsugóðan mat hvønn dag. Tað hevur stóran týdning, at næmingar fáa heilsugóðan mat, meðan tey ganga í skúla, soleiðis at tey tíðliga í lívinum venja seg til at eta sunt. Hetta metir minnilutin vera so mikið týdningarmikið mál at loysa, at peningur eigur at kunna finnast til endamálið. Minnilutin mælir tí Løgtinginum til at samtykkja upprunauppskotið.

**Minnilutin** (Teitur Horn Baldvinsson og Hervør Pálsdóttir) tekur ikki undir við málinum. Minnilutin heldur, at tað er trupult at ímynda sær, at pláss skal fáast fyri einari kantinu ella einum matarhøli í hvørjum skúla í Føroyum. Fleiri bygdaskúlar eru smáir, og krevur tað tí umbyggingar, um kantinur/matarhøli skulu gerast. Tað er órealistiskt, at fígging kann fáast til vega til kantinur ella

matarhølir á øllum skúlum, soleiðis sum fíggjarliga støðan er í landinum í løtuni. Umframt hetta heldur minnilutin, at tað er meira týdningarmikið at brúka pening til annað endamál í fólkaskúlunum enn matarhølir, t.d. er stórur mangul uppá vikarar í fólkaskúlunum í Havn. Minnilutin mælir tí Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 7. februar 2012**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan í Dímun Højgaard<br>Formaður | Teitur Horn Baldvinsson<br>Næstformaður | Tóra Á Løgmansbø Bláhamar |
| Hanus í Horni Nielsen | Jákup Poulsen | Eyðrið Mortansdóttir |
| Marita Thorsteinsson | Kristina Mouritsen | Jóanis Albert Nielsen |
| | Hervør Pálsdóttir | |